Nú tú skjótt
í skúla fer, tú
rokning dugur
sær man her.
Í tímunum tú sita
stillur skal, tað
klárar tú nokk
sera væl.
Tí rokning tú
dugur væl longu
nú, elskaði fitti
og raski tú.
Tillukku við 7
ára degnum.
**Ynskja omma
og mostrarnar**

Hey omma
Tillukku við
føðingardegnum
17. juli. Eg gleði
meg til tú kemur
til Danmarkar.
Heilsan Ida



Eg og foreldur míni
takka hjartaliga øllum,
sum gleddu meg á fermingardegnum
16. mars 2008.
Heilsan Ásleyg Súnadóttir, Argir

Góði elskaði abbi!
Nú fyllir tú skjótt 60 ár. Vit vilja ynskja tær hjartaliga til lukku við degnum. Vit gleða okkum til vit fara í summarhús, og har feira dagin saman við tær og ommu. Vit taka tráðuna við, men tað verðu torført at fáa tílíkar aftur :-) Hjartaliga tillukku.
Vinarliga abbabørnini

**Góða Judith omma
og Finn abbi**
Hjartaliga tillukku á gullbrúdleypsdegnum 19. juli. Gleða okkum at halda dagin saman við tykkum í Danmark.
Bestu heilsanir Fríða, Finnur, Silja, Andreas og Jóhannes

Lesið
Sosialin
-so eru tit við!

Góði Rógvi
Tillukku við føðingardegnum. Sovorna kuula motorsúkklu skulu vit hava, tá vit verða stórir.
Kærar heilsanir Rani

Góði fitti Rógvi
Omma og abbi ynskja tær tillukku við 6 ára føðingardegnum. Tú dugir so væl at blása bløðrur.





Góða Gertrud og Elmar
Hjartaliga tillukku 22.
og 30. juli.
Ynskja mamma og pápi